Eitt 2 ára gamalt barn ynskir sær ein aktivitetsvegg at spæla við.

Barnið dámar væl at spæla við knøttar av ymiskum slag, t.d. fjarstýring, kontaktir v.m.

Eisini spælir barnið nógv við spælidjór, ymisk sløg av bóltum og alt sum hevur hjul.

Yndislitirnir hjá barninum eru grønt, appilsingult og reytt.

Uppgávan:

Tú skalt byggja ein aktivitetsvegg til barnið.

1. Fá hugskotsmyndir frá tínum lærara.
2. Tekna nakrar skitsur av aktivitetsvegginum á pappír.
3. Vel tí skitsuna, sum tær dámar best.
4. Tosa við læraran um skitsuna.
5. Ger ein tilfarslista í punktform.
6. Vís læraranum tilfarslistan.
7. Kanna hvat tilfar tú hevur atgond til og sleppur at brúka.
8. Samla tey tingini, sum tú hevur brúk fyri til projektið og sleppur at brúka.
   *Er nakað á tilfarslistanum, sum tú ikki hevur atgongd til ella ikki sleppur at brúka, finn so okkurt alternativt at skifta hetta út við*.
9. Fá læraran at koma at hyggja eftir teimum tingunum, sum tú hevur funnið.
   Forklára gongdina fyri læraranum
   *Dømi uppá setningar: "Tað fyrsta eg geri er at saga hetta til tað og tað støddina uppá hendan mátan við hesari sagini", "síðani fari eg at pussa", "aftaná tað máli eg hetta og hatta soleiðis og soleiðis", "hareftir taki eg hetta og geri soleiðis" o.s.fr. …*
10. Skriva eina einfalda mannagongd.
11. Fá mannagongdina góðkenda.
12. Far ígongd við projektið.










3

